# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Minningarorð um babba



Vit vilja takka babba fyri tíðina, sum vit fingu saman við honum, vit fingu nógvar sera góðar løtur saman við honum.

Hvørja ferð vit eru keddar tonkja vit, at hevði hann verið so keddur, og hevði hann kunna valt sjálvur, hevði hann valt at verið eftur hjá okkum. Vit kunnu bara gleða okkum til vit møtast aftur ein annan dag.

Hetta er bert ein heilsan frá mær!

Eg vil bara takka babba fyri tíðina saman við honum.

Øll vóru góð og glað fyri hann, og hann var glaður og góður við okkum!

Hann var glaður fyri hvønn dag, og hevði hann kunna valt sjálvur, hevði hann valt at verið her hjá okkum. Vit elskaðu hann øll, og hann elskaði okkum! Hann var altíð uppá fartin, tá onnur høvdu brúk fyri tí. Og tað var ongantíð nakað keðiligt við babba! Sjálvandi kom tað sum eitt stórt sjokk at hetta hendi…

*Eg vil bara gleða meg til vit ein dag møtast aftur..* Og ein heilsan til ommu og abba við Gjógv, og minnist til at um tað er nakað so ber altíð til at tosa við meg!..

**Ester**

Góði babba hví doyði tú? og tað var tú sum lærdi meg at syngja og tekna, og eisini alt annað sum tú hevur gjørt fyri okkum øll.

**Døgg**

Eg eri glað fyri, at eg kom at kenna Birgir, og eg eri glað fyr, at vit komu at kennast so væl! Eg eri sera glað fyri at hann gjørdi so nógv fyri meg og var so góður við meg, at tað er næstan ikki til at skilja!

Hann var altíð klárur at hjálpa, hann gjørdi so nógv fyri onnur, vit vóru nummar 1 og hann nummar 2!

Men eg kann bara gleða meg til vit einaferð møtast aftur uppi í himli! Tí hann hevur tað betri enn nakar annar her á jørð! Hetta er eitt brot í einum sangi, sum mær dámar væl: lívið kann broyta alt, eitt hjarta kann fara í túsund pettir! Og tað er soleiðis vit øll hava tað nú.

**Drós**

# Stórir møguleikar í nýggja banka Sparikassans

Í dag hevur Føroya Sparikassi endaliga avgreitt keypið av Kaupthing Bank A/S í Danmark. Við keypinum ognar Sparikassin sær ein vinnulívsbanka við fleiri møguleikum enn upprunaliga fráboðað.

Føroya Sparikassi hevur nú endaliga ognað sær Kaupthing Bank A/S í Danmark. Fíggjareftirlitið hevur góðkent handilin, ið er avgreiddur.

Við avgreiddu keypsavtaluni hevur Sparikassin ognað sær ein banka við uppaftur fleiri møguleikum enn upprunaliga fráboðað.



### Sterkari støðu innan virðisbrævarøkt

Upprunaliga ætlanin var, at FIH Erhvervsbank A/S, ið er ogn hjá Kaupthing Búnaðarbanka, skuldi keypa virkisøkini Corporate Finance, Private Banking og Markets burtur úr Kaupthing Bank A/S. Eftir samrøður partanna millum er semja tó um, at bert Corporate Finance-parturin fer til FIH.

Markets er virkisøkið, ið fevnir um ráðgeving, keyp og sølu av virðis-, láns- og partabrøvum. Private Banking umfatar røkt av pengum hjá múgvandi privatpersónum. Corporate Finance umfatar keyp og sølu av fyritøkum, útvegan av kapitali til slíkan handil v.m.

»Vit fegnast um keypið, ið ber í sær, at Sparikassin hevur ognað sær ein vinnulívsbanka, sum hevur fleiri bein at standa á og eitt fullfíggjað útboð av tænastum at bjóða kundum sínum«, sigur Marner Jacobsen, forstjóri í Føroya Sparikassa.

Hann vísir á, at Sparikassin við hesum hevur styrkt støðu sína innan virðisbrævarøkt bæði í Føroyum og í Danmark.

### Fleiri starvsfólk

Nú Kaupthing Bank A/S varðveitir virkisøkini Private Banking og Markets, verður starvsfólkatalið í dóttirbankanum munandi størri enn áður fráboðað. Upprunaliga var ætlanin, at 10-12 starvsfólk skuldu arbeiða í bankanum, men nú kemur talið upp á 30.

Føroya Sparikassi var við til at stovna Kaupthing Bank A/S í 2001, upprunaliga við 20 prosentum av partapeninginum, ið síðani varð øktur til 25 prosent.

Eftir bert trimum árum er bankin mentur soleiðis, at hann pr. 30. juni 2004 hevði ein javna uppá 1,032 mia. kr. og eitt yvirskot fyri hálvárið uppá 7,3 mió. kr. Eginognin var 128 mió. kr.

Við keypinum av Kaupthing Bank A/S gerst virksemið hjá Sparikassanum uttanlands meira sjálvstøðugt, samstundis sum virkisgrundarlagið hjá Sparikassanum verður víðkað. Eftir yvirtøkuna av bankanum økist javnin hjá Sparikassanum sum samtak við uml. 850 mió. kr., soleiðis at hann fer upp um 6 mia. kr.

Nýggja stigið er í tráð við eitt av málum Sparikassans um at hava virksemi uttanlands fyri at spjaða váðan út um gongdina í føroyska samfelagnum.

Serfrøðingur:

### Prísvøkstur møguliga fyribils fyribrigdi

Øktir oljuprísir eru høvuðsatvoldin til vaksandi inflasjónina í Føroyum í fjør, men við fallandi oljuprísum er møguligt, at inflasjónin eisini minkar frameftir, heldur Johnny í Grótinum, búskaparfrøðingur og ráðgevi á fíggjardeild Sparikassans.

### Oljuprísur økir føroyska inflasjón

Fólk fáa støðugt minni fyri lønarinntøku sína, tí hetta seinasta árið er vend komin í gongdina í inflasjónini. Tað eru serliga teir hækkandi oljuprísirnir, sum skapa inflasjón.

### Skemtarar stovna smápartafelag

Menninir aftan fyri væl umtókta undirhaldsbólkin Pipar & Salt hava stovnað eitt smápartafelag, sum m.a. skal fáast við virksemi innan gaman og álvara.


# Nøvn í vikuni

**Kennir tú onkran …**

Kennir tú onkran í familjuni, á arbeiðsplássinum, í grannalagnum ella hvar tað skal vera, ið hevur ein merkisdag sum t.d. rundan føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv ella annað, so sig okkum frá.



Tú skal bara skriva navn og bústað og um gjørligt aðrar upplýsingar eisini um tann persónin tú heldur eigur at koma í blaðteigin "Nøvn í vikuni", so taka vit okkum av restini. Tú ert eisini vælkomin at senda okkum nøkur orð og um møguligt mynd. Annars hava vit góðar journalistar og fotografar til slíkar uppgávur.

Navn:...........................................................................................................
Bústaður:....................................................................................................
Bygd/býur:...............................................................Tel:......................................
Evt. arbeiðspláss:......................................................................................

Merkisdagurin er: ..........................................................................................

Innsendari: .................................................................Tel:...............................

Sendið lepan, í brævbjálva, til:
Sosialurin • Postboks 76 • FO-110 Tórshavn • "Nøvn í vikuni"

Eisini ber til at støkka inn á gólvið, ringja, faxa ella senda teldupost til redaktiónir okkara kring alt landið:

Høvuðsstaðarøkið: tel. 34 18 00/21 61 35, fax 34 18 01, teldupost: maggi@sosialurin.fo
Norðoyggjar: tel. 45 86 86, fax 45 86 87, teldupost: solby@sosialurin.fo
Eysturoy: tel. 44 78 20, fax 44 95 20, teldupost: vilmund@sosialurin.fo
Suðuroy: tel. 37 53 64, fax 37 54 64, teldupost: aki@sosialurin.fo
Vágar: tel. 33 38 20, fax 33 37 20, teldupost: edvard@sosialurin.fo